Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Dagfesting: 7. mars 2024
Málsnummar: 23/19558
Málsviðgjørt: uak

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	Løgtingslógaruppskotið
	1. Aftaná § 1, stk. 1, verður sett nýtt stk. 2: "*Stk. 2.* Endamálið við § 58 a er at fremja nettrygd.''
	2. Aftaná § 2, stk. 4 verður sett: *''Stk. 5.* Ásetingarnar í stk. 1-4, eru ikki galdandi fyri § 58 a. *Stk. 6.* Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um, hvat virksemi er fevnt av § 58 a.''
§ 58 ... *Stk. 2.* Fjarskiftiseftirlitið kann savna inn øll dáta og allar upplýsingar, ið eru neyðugar fyri at fremja eftirlitsuppgávur og yvirvøkuuppgávur sínar, undir hesum roknskap og roknskaparskjøl o.a. Fjarskiftiseftirlitið kann eisini krevja, at	**3.** § 58, stk. 2, verður orðað soleiðis: "*Stk. 2.* Fjarskiftiseftirlitið kann krevja allar upplýsingar, dátur o.a. útflýggjaðar, sum Fjarskiftiseftirlitið metir hava týdning fyri virksemið hjá Fjarskiftiseftirlitinum ella fyri at gera av, um ávís viðurskifti eru partur av øki

dáta ella upplýsingar verða latnar inn regluliga, og kann seta krøv til innihald, uppseting, elektroniska innlating, innlatingarfreistir o.a.	løgtingslógarinnar. Upplýsingarnar, dátur o.a. kunnu vera av einum og hvørjum slag. Fjarskiftiseftirlitið kann eisini krevja, at dátur ella upplýsingar verða latnar inn regluliga, og kann seta krøv til innihald, uppseting, elektroniska innlating, innlatingarfreistir o.a.''
	4. Aftan á § 58, stk. 2, verður sett nýtt stk. 3: "*Stk. 3.* Tað er skyldan hjá ráði, stovni, fyritøku, samtøku av fyritøkum og øllum løgfrøðiligum og likamligum persónum at veita upplýsingar sambært stk. 2."
	5. Aftan á § 58 verður sett: "**§ 58 a.** Fjarskiftiseftirlitið viðger upplýsingar, dátur o.a. og kortleggur undirstøðukervi, undir hesum samfelagstýðandi undirstøðukervi, og sínámillum sambond, við tí endamáli at fremja nettrygd. *Stk. 2.* Fjarskiftiseftirlitið kann krevja allar upplýsingar útflýggjaðar, sum Fjarskiftiseftirlitið metir hava týdning fyri kortlegging sambært stk. 1. *Stk. 3.* Tað er skyldan hjá ráði, stovni, fyritøku, samtøku av fyritøkum og øllum løgfrøðiligum og likamligum persónum at veita upplýsingar sambært stk. 2. *Stk. 4.* Fjarskiftiseftirlitið ger av, hvør er at meta sum veitari av samfelagstýðandi tænastum. S*tk. 5.* Veitarar av samfelagstýðandi tænastum hava skyldu at boða Fjarskiftiseftirlitinum frá um broytingar í undirstøðukervinum, sum kunnu hava týdning fyri kortleggingina. Fjarskiftiseftirlitið metir um, hvørjar broytingar eru at meta sum týðandi. *Stk. 6.* Fjarskiftiseftirlitið letur ikki upplýsingar víðari. Tó kann Fjarskiftiseftirlitið lata veitarum av samfelagstýðandi tænastum yvirlit yvir egið undirstøðukervi og sambond teirra við onnur undirstøðukervi og skipanir. Eftir ítøkiliga meting kann Fjarskiftiseftirlitið í ávísum førum lata týðandi veitarum yvirskipað yvirlit yvir undirstøðukervi og sambond hjá

	øðrum veitarum av samfelagstýðandi tænastum til tess at styrkja nettrygdina. Slík yvirskipað yvirlit mugu ikki fara longur niður í smálutir og ikki røkka breiðari enn neyðugt til tess at røkka endamálinum, og skulu taka atlit til at verja trygdina og handilsloynidómar o.a. hjá øðrum veitarum. Stk. 7. Fjarskiftiseftirlitið kann gera portraskanning av interneti. Stk. 8. Um Fjarskiftiseftirlitið í sambandi við viðgerð av upplýsingum sambært stk. 1 ella stk. 7 gerst kunnugt við viðurskifti, sum eru til vanda fyri nettrygdina, kann Fjarskiftiseftirlitið venda sær til viðkomandi myndugleika ella fyritøku o.a. og m.a. lata viðkomandi upplýsingar og ráðgeving við tí endamáli at fremja nettrygd. *Stk. 9.* Fjarskiftiseftirlitið kann gera av at beina burtur upplýsingar, sum verða viðgjørdar í sambandi við kortlegging sambært stk. 1 og skanning sambært stk. 7. *Stk. 10.* Løgtingslóg um innlit í fyrisitingina, lóg um vernd av persónupplýsingum og løgtingslóg um skjalasøvn eru ikki galdandi fyri upplýsingar, mál, kanningar, kortlegging o.a. sambært § 58 a. Hetta er eisini galdandi, tá ið upplýsingar, sum eru fingnar til vegar ella eru viðgjørdar sambært § 58 a, eru latnar øðrum myndugleika. *Stk. 11.* Fjarskiftiseftirlitið kann lata øðrum eftirlitsmyndugleikum í Føroyum og í øðrum londum upplýsingar, um tað er neyðugt til tess at fremja endamálið við nettrygd. *Stk. 12.* Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um, hvussu upplýsingar, sum verða latnar sambært stk. 11, kunnu latast øðrum eftirlitsmyndugleikum.“